Vit vilja hervið í stuttum greiða borgarum okkara frá gongdini í kommununi farna árið, tað fyrsta hjá núsitandi býráði.

Høvuðsmálini hjá nýggja býráðnum eru:

- At fáa til vega nøktandi tal av grundstykkjum í kommununi, tí eftirspurningurin er sera stórur. Kommunan eigur alt ov fá grundstykkir. Býarplanurin er endurskoðaður og víðkaður, so fleiri grundstykkir fáast. Ein felags byggisamtykt er gjørd fyri alla kommununa.
- At fáa bygdirnar í kommununi at vera meira ruddiligar og gera arbeiðir, sum byrjað er uppá, liðug. Avtala er gjørt við serkønt fólk um at arbeiða fyri kommununa í eitt avmarkað tíðarskeið at tilrættisleggja rudding av kommununi.
- At fáa eldraøkið at virka betur, enn tað hevur gjørt undir landinum. Arbeitt verður støðugt við at betra um tænasturnar hjá Heimatænastuni í Vágum. Arbeiðið gongur framá. Heimið á Sýnini er nú næstan liðugt umvælt. Tað verður liðugt fyrst í 2018.
- At betra um skúlaviðurskiftini. Byrjað er at fyrireika annað byggistig av skúlanum á tekniborðinum.

Býráðið fer framhaldandi at virka fyri trivnaði og framburði við ynski um at hava eina kommunu, har øll kenna seg væl. Virðisgrundarlagið er **lívsgleði, samskifti og framskygni**.

Stutt frágreiðing um tær uppgávur, ið eru ella vera loystar:

- Ætlanin er sum skjótast at innrætta nøkur serhøli í **Nýggja skúlanum** á Giljanesi. Eisini fer býráðið, saman við leiðslu skúlans, at arbeiða við ætlanum um víðari útbygging av skúlanum.
- **Eldraøkið** var lagt út til kommunurnar at umsita tann 1. januar 2015, og skulu tænastur veitast borgarunum sambært lóg. Við yvirtøkuni av eldraøkinum, er fíggjarætlanin hjá kommununi økt sera nógv og er nú umleið 90 mió. Umleið 70 fólk starvast í løtuni í Heimatænastuni.
  Kommunurnar hava fingið eitt rentufrítt lán frá landinum uppá kr. 15.750.000,- og eitt rentu- og avdráttarfrítt lán uppá kr. 15.750.000,- til at umvæla **Heimið á Sýnini** fyri. Hetta hevur higartil ikki víst seg at vera nóg mikið. Vága kommuna hevur tí higartil játtað kr. 5.100.000,- í eykajáttan til umvælingina, og Sørvágs kommuna tilsvarandi upphædd í mun til fólkatalið.
  Nú heimið hevur verið umvælt, hevur partur av bygninginum á Sýnini verið tømdur og stongdur. Hesin parturin er so liðugt umvældur og tikin í nýtslu aftur, meðan annar partur av bygninginum er stongdur og umvældur.
  Meðan partar av heiminum vóru stongdir, var neyðugt at finna onnur høli ístaðin. Í Ivansa húsi búgva 7 fólk, meðan Heimatænastan hevur leigað 4 búpláss frá VEKS *til september í ár.*
  Alt skrivstovuvirksemið var flutt á gomlu kommunuskrivstovuna í Miðvági o*g flutti aftur á Sýnina í januar 2017.*

- **Dagtilhaldið** var flutt í kjallaran í Miðgarði, har tey gomlu og børnini sleppa at vera saman, báðum pørtum til fragd og frama.
  Fimleikurin var fluttur í fimleikahøllina og í auluna á Skúlanum á Giljanesi. Har eru eisini hugnaløtur við fyrilestrum.
  Kommunurnar ynskja at styrkja Heimatænastuna og geva okkara gomlu og óhjálpnu eina góða og fjølbroytta tænastu. Síðan yvirtøkuna hevur verið arbeitt við fleiri broytingum til tað betra. Endurvenjing er sett á breddan, og verður øll tænasta tvørfakliga "visitera".
  Heimið á Sýnini kemur, tá tað er liðugt, umframt at vera eitt heim við smærri eindum, eisini í størri mun at virka sum ein eldradepil við fleiri tilboðum til eldri, sum ikki búgva á heiminum. *1. hædd ella kjallarin verður miðdepilin innan venjingar og rehabilitering.*
  Nýggjur bygnaður fyri Heimatænastuna í Vágum varð góðkendur av stýrinum 13. september 2017.
  Á 1. hædd verður stór venjingarhøll til allar fyribyrgjandi-, viðlíkahalds- og endurvenjingar til stórar og smáar bólkar. Eisini verður fundarhøli, høli til undirvísing - bæði til starvsfólk, avvarðandi og borgarar. Stórt rúm í miðjuni, sum kann brúkast til nógv ymiskt virksemi: kaffistova, tiltøk, andaktir og annað.
  Ergo- og fýsioterapi, heimasjúkrarøktarfrøðingarnir og heimahjálpirnar koma eisini at halda til har.
  2. hædd á Sýnini "Miðstova" verður eldra- og demensheim við denti á socialpædagogiska minniskveikjandi røkt, og á 3. hædd verður rehabiliteringsdeild og eldraheim. Rehabiliteringsstovurnar eru ætlaðar okkara eldru í Vágum, eisini verður ein palliativ stova og umlætting. Rehabiliterandi arbeiðsgongdir skulu síggjast aftur í allari tænastuni.
  Í aðru viku í januar 2018 letur rehabiliteringsdeildin á 3. hædd upp, og skjótt aftaná tað verður restin av búøkinum liðugt og tikið í nýtslu. 1. hædd verður væntandi liðug um nakrar mánaðir.
- **Samstarv**. Vága kommuna og Sørvágs kommuna hava gjørt avtalu við Reyða Kross Føroya um vitjunartænastu og sambinding.
- **Vitjunartænasta**. Hansia Nattestad samskipar vitjunartænastuna í Vága kommunu. Hava fólk áhuga at gerast vitjunarvinir, ella eru tað fólk, sum ynskja vitjan ella næstringar og onnur, sum kenna onkran, sum ynskir at fáa vitjan, eru hesi vælkomin at seta seg í samband við vitjunartænastuna á tlf. nr. 229705.
- **Sambinding**. Endamálið við Sambinding er at knýta vinabond millum vaksin ella børn og vaksin.
  Vit eru vælsignaði við fleiri tilflytarum. Ikki øll teirra hava familju her. Brúk er tí fyri, at tey fáa vinir her í kommununi, eins og vit hava brúk fyri at gerast vinir við hesar nýggju borgarar okkara.
  Skipað verður fyri tiltøkum á bókasavninum, har fólk møtast til ein drekkamunn, innsløg, prát og hugna. Í Vága kommunu eru tað Rósa Samuelsen, Oddmar Ravnsfjall, Maiken Joen-Jacobsen, Nely B. Haraldsen, Paula Joensen og Salve Nattestad sum skipa fyri tiltøkunum.
- **Grundstykkir**. Býráðið leggur stóran dent á, at tørvurin á grundstykkjum í kommununi má nøktast. Í løtuni hevur kommunan bert 3 byggibúgvin grundstykkir í Sandavági á sølulista. Hetta arbeiðir býráðið við at bøta um.
  Arbeiðið at gera útstykkingina við Stóraklett í Sandavági er næstan liðugt. Talan er í fyrstu syftu um 11 grundstykkir. Hesi eru umbiðin og nøkur teirra seld. Vit rokna við, at sølan av restini kann avgreiðast innan ein mánað. Arbeitt verður við at fáa til vega fleiri grundstykkir við Stóraklett í 2018. Umframt tað er ætlanin at gera klárt til nýggja útstykking sunnanvert Fossá.
  Kommunan hevur eisini gjørt eina nýggja útstykking eystan fyri Gjónna Heimaru í Vatnsoyrum. Her eru 4 grundstykkir. Fyrispurningar hava verið um tey, men tey eru enn ikki seld.
  Ein útstykking verður í løtuni gjørd við Olivarsveg í Miðvági. Her verður fyrst talan um 13 grundstykkir, sum væntandi kunna seljast í summar, og síðan 5 omanfyri hesi, sum kunna seljast í heyst. Eisini er ætlanin at gera eina útstykking uppá 6 grundstykkir við Skaldaveg.
  Í 2018 verður ein nýggj útstykking á Heiðatrøðni projektera. Fyrireikingar at keypa lendi verða eisini gjørdar í 2018, so lendið kann keypast og útstykkingin gerast í 2019.
  Býráðið hevur sent skriv til Landsverk, har heitt verður á tey um at gera eina rundkoyring á Giljanesi niðan fyri Eyðansstovu-bóndagarðin. Tá henda rundkoyring er gjørd, verður farið undir at stykkja út á Húsanesinum.
  Rundkoyringin skal eisini taka ímóti ferðslu frá húsunum við Nesavegin, skúlanum, teimum 3 eystastu húsunum á Jatnavegi, húsunum á Húsanesvegi, Heiminum á Sýnini og pørtum av Húsagarði.
  Býráðið hevur gott samskifti við **Bústaðir** um bygging av íbúðum í kommununi. Tosað verður um konkretan møguleika. Avbjóðingin er at fáa handverkarar at átaka sær arbeiðið. Býráðið metir, at stórur tørvur er á íbúðum til:
  1. **Ungfólk**, sum enn ikki eru klár at byggja sær eini sethús.
  2. **Eldri fólk** sum meta, at teirra sethús eru vorðin ov stór til teirra tørv, og ynskja sær eini smærri hús, ið eru lættari at halda.
  3. **Fólk við serligum tørvi,** sum av einihvørji orsøk ikki kunna búgva heima.
- **Byggisamtykt**: Arbeiðið at gera eina almenna byggisamtykt fyri Vága kommunu er loksins at enda komið í 2017. Býráðið samtykti byggisamtyktina í 2016 og Heilsu- og innlendismálaráðið góðkendi hana í oktobur 2017. Hetta er fyrsta almenna byggisamtyktin fyri Vága kommunu, og avloysir hon almennu byggisamtyktirnar, sum áður hava verið galdandi fyri ávikavist Sandavág, Miðvág og Vatnsoyrar. Almenna kortið hjá kommununi er tøkt á heimasíðu okkara. Umframt 'vanligu' upplýsingar um matriklar og leiðingar, eru eisini kirkjugarðsupplýsingar og staðarnøvn. Ætlanin er, at staðarnøvn fyri Miðvág og upplýsingar um krígsminni verða gjørd tøk á kortinum eisini.
- **Endalig loysn á kloakk-viðurskiftunum.** Landsstýrið hevur ásett, at í seinasta lagi í 2015 skuldu allar kloakkir leggjast út á streymasjógv. Kommunan hevur latið inn spillivatnsætlan til Umhvørvisstovuna. Sambært langtíðarfíggjarætlanini klárar kommunan ikki at hava øll kloakkviðurskifti í lagi fyrr enn einaferð aftaná 2020. Kommunan hevur síðan 2016 arbeitt við at leggja kloakkina frá Kumlasteinunum út um brimgarðin. Hetta eydnaðist loksins undan jólum, tá pumpan við Ytru Bryggju varð tendrað.
  Í 2018 er ætlanin at binda kloakkina, sum rennur út á Tormansbakka, í pumpuleiðingin við Kumlasteinarnar, so eisini hetta kloakkvatnið verður pumpað út um brimgarðin. Hetta arbeiðið er boðið út.

Kommunan hevur gjørt nógvar ábøtur á verandi kloakkir, m.a. við at loysa avbjóðingina, at ov nógv reint vatn kemur í kloakkirnar, sum viðførir, at rørini ikki svølgja, tá áarføri er.

- **Býráðið hevur, samtykt eina ferðslutrygdarætlan fyri alla kommununa**. Trygdin hjá børnunum, sum ferðast til og frá skúlunum, fyllir nógv í hesi ætlan, umframt ov nógv ferð og atburður í ferðsluni. Serliga kann tann myrka tíðin á árinum vera vandamikil, tí ferðslan er so nógv, tá børnini fara í skúla.
  Býráðið skal nýta ætlanina at halda seg til, tá ferðslutrygdarábøtur skulu gerast og annars í øllum arbeiði við vegum í kommununi.
  Býráðið heitir á fólk um at vera varin í ferðsluni. Tíverri hava ferðsluvanlukkur kostað alt ov nógv mannalív og stórar mannskaðar farnu árini. Eisini vit í okkara kommunu hava verið hart rakt.
- Kommunan hevur einki **asfalterað** í 2017, men býráðið hevur ætlanir um at asfaltera **Miðbrekku** og part av **Nýggjavegi** í 2018.
- **Tvørgarður**. Arbeiðið at gera 2. byggistig av endaligu loysnini (Tvørgarðsgøtu-Ápramsveg) og binda Tvørgarðsgøtu í Gummaldagøtu er gjørt. Býráðið hevur ætlanir um at gera gongugøtu úr Tvørgarðsgøtu inn í Hús í 2018. Hetta er eisini partur av ferðslutrygdarætlanini.
- **Traðarvegurin** skal kunna taka ímóti meira ferðslu, enn hann ger í dag, tí ætlanir eru um at gera útstykkingar úti á Trøð í framtíðini. Avgjørt er tí at gera projekt av at dagføra vegin.
- **Kirkjugarðurin** í Sandavági er um at verða fullur.
  SP/F Westtech hevur gjørt prosjekt til víðkan av verandi kirkjugarði. E.M. Ráðgeving hevur gjørt prosjekt til at gera nýggjan kirkjugarð Úti á Bakka. Býráðið kemur heilt skjótt at taka støðu til, hvør loysn verður vald.
- **Kirkjugarðurin** í Miðvági fer eisini at fyllast, so neyðugt er við fleiri gravum um stutta tíð. Fyribils uppskot er gjørt um at fáa til vega fleiri gravir.
- Arbeiðið við at væla um Ungdómshúsið Loftið er fyribils steðgað upp. Býráðið skal í komandi ári taka støðu til, um haldast skal fram við at umvæla húsið, ella um onnur loysn skal veljast.
- Kommunan hevur hampað um økið við **minnisvarðan av Mikkjal á Ryggi,** men tað arbeiðið er ikki liðugt. Ætlanin er at taka betonggarðin norðan fyri minnisvarðan burtur og laða grótgarð ístaðin. Ein avbjóðingin er tað eisini, at sera hált er á flísunum við minnisvarðan, tá kavi er. Enn er eingin endalig loysn funnin á málinum.
- Arbeitt verður við at gera **spælipláss** norðri í Sørpum. Kommunan hevur latið økið drena í 2015. Meiningin er, at kommunan skal rinda fyri tilfar, meðan íbúgvarnir gera arbeiðið sjálvboðið.
- Garðurin fram við Kirkjavegi er nú liðugur, ljós eru sett á garðin, og har er plantað.
- "Spuliplenan" er tikin burtur og ein vøkur trappa (**Kirkjatrappan**) laðað ístaðin, eins og stórir steinar eru lagdir fram við áarbakkanum á niðasta partinum av Hýsisá. Gamla Gøta, frá gomlu betongbrúnni niðan til, har gamla træbrúgvin var, er grivin fram aftur. Ljós er sett á gamla vallgarðin á Tungu og á Kirkjatrappuna. Ætlanin er at gera nýggja træbrúgv at seta ístaðin fyri ta gomlu.
- Gøtan niðan fyri vøllin og við Kumlasteinarnar verður hampa, eins og gongubrúgv verður gjørd frá Tormansbakka til gøtuna undir vøllinum. Ljós verða ætlandi sett við gøtuna í komandi ári. Hetta verður partvíst gjørt í samband við spillivatnsarbeiðið, sum verður gjørt í ár
- Byrjað er at breiðka **Kálvalíðvegin**, so bussar í framtíðini kunna koyra niðan í Kálvalíð. Nýggir ljóssteyrar verða settir upp ístaðin fyri teir gomlu træpelarnar.
- Arbeiðið at gera Fiskatorg á ytru Bryggju er næstan liðugt. Frárensl er lagt frá økinum, vatn og el lagt til, og økið er betongað. Nú manglar at seta góðkent borð upp. Tá tað er gjørt, verður møguligt at keypa nýfiskaðan fisk frá útróðrarmonnum.
- Gøtan fram við Stórá í Sandavági er gjørd aftur og snotuligur garður laðaður fram við henni, so nú er gott at ganga fram við ánni frá viðarlundini oman í Kirkjuna.
- Arbeitt verður við at skifta gomlu træpelarnar við Nesavegin í Sandavági út.
- Borgararnir í Vága kommunu hava í nógv ár fingið reinsað drekkivatn. Nú verður arbeitt við at **løggilda** reinsiverkini. Krav er, at reinsiverkini verða løggildað. Fyri reinsiverkið í Miðvági er hetta arbeiðið næstan komið á mál. Arbeiðið at løggilda tey bæði reinsiverkini í Sandavági verður síðani gjørt. Til tess at betra um stýringina av drekkivatnsskipanini og at tryggja góðskuna av vatninum, hevur kommunan gjørt avtalu við Nomatek um veitan av flóðmátarum og tóli at vísa UV-dosis og við Klima um veitan av stýrisskipan til eftiransan av reinsiverkinum í Miðvági. Hetta kemur væntandi at virka tíðliga í vár.
- Vatntrýstið í teimum ovastu húsunum Norðri í Heiðum hevur verið ov lágt. Kommunan setti seinasta summar hydrofor á vatnleiðingin, so nú er trýstið í lagi.
- Fyrireiking til **vetrarfriðing** er byrjað, eitt uppskot fyriliggur at arbeiða víðari við.
  Samtykt er, at Vatnsoyrar skulu vetrarfriðast. Samrøður hava verið við umboð fyri omanfyriliggjandi haga um málið. Somuleiðis skal almennur kunnandi fundur vera, har greitt verður frá fyrimunum og vansum við vetrarfriðing.
- Kommunan hevur keypt 3 arbeiðsmaskinur. Tann eina var keypt fyri eina gamla, sum var niðurslitin. Hinar báðar eru væl smærri og skulu fyri ein part nýtast til at grava kava á gongubreytunum.
- Arbeitt verður framhaldandi við at **fríðka** í øllum bygdunum í kommununi.
- Kommunan hevur keypt fyrrverandi Trolhúsið á Innaru Bryggju. Húsið skal nýtast til goymslu og til arbeiðshølir hjá arbeiðsfólkunum. Nú arbeiðsfólkið fær nýggjan og størri bygning, flytur sløkkiliðið í tann gamla bygningin hjá arbeiðsfólkunum.

Býráðið roynir í mest møguligan mun at gera arbeiði liðug. Málið hevur verið, at nýggjar verkætlanir skulu gerast heilt lidnar.

Lánini: Nú so nógv arbeiðir eru gjørd og eru í gerð, hevur verið neyðugt at hækka lánini. Hetta var serliga aktuelt í 2013 í samband við skúlabyggingina. Tó eiga vit eisini nakrar krónur á bók. Niðanfyri hava vit sett gongdina síðan 2000:

Ár (mió. kr)	00	01	02	03	04	05	06	07	08
Lán við árslok	34,2	28,8	23,4	17,7	12	7,5	4,1	0,9	16,2
Nettoskuld árslok	19,1	5,9	4,1	-0,6	-7,2	1	-11,8	-8,7	-0,6

Ár (mió. kr)	09	10	11	12	13	14	15	16	17
Lán við árslok	24,8	32,9	49,6	52,6	88,2	74,2	71,1	73,8	60
Nettoskuld árslok	16	24,4	43,5	51	74,1	68,3	57,4	67,1	50,5



Virksemið: Arbeiðsplássini í samfelag okkara broytast støðugt. Flest øll kundu vit ivaleyst hugsað okkum, at tað vóru fleiri arbeiðspláss í kommunu okkara. Tó, borgarar okkara hava verið raskir at funnið sær arbeiði, tað veri seg innan fyri kommunumark, ella aðrastaðni.

Talið á persónum, sum fáa stuðul frá **Arbeiðsloysisskipanini**, er tíbetur minkað nógv, sum tað sæst niðanfyri, men okkara ynski er, at øll, sum hava heilsu til tað, skulu kunna fáa arbeiði:

Ár	09	10	11	12	13	14	16	17
Menn	22	37	38	35	24	11	3	3
Kvinnur	26	44	48	38	38	25	8	3
Ialt	**48**	**81**	**86**	**73**	**62**	**37**	**11**	**6**



Skattskylduga inntøkan í kommununi, sum er vaksin støðugt seinastu nógvu árini, støðgaði á í 2009, men veksur nú aftur sum víst niðanfyri:

Ár	94	95	96	97	98	99	00	01
Mió.	127,0	134,3	140,7	149,9	154,2	168,1	192,6	196,9

Ár	02	03	04	05	06	07	08	09
Mió.	222,5	232,6	235,5	246,6	275,1	302	315,6	312,1

Ár	10	11	12	13	14	15	16	
Mió.	332,4	347,4	357,1	364,3	385,4	401,9	420,4	



Skatturin verður ikki endaliga uppgjørdur fyrr enn í oktobur árið eftir, so tølini fyri 2017 kenna vit ikki enn.

Skattaprosentið: Sum greitt er frá, liggja sera stórar avbjóðingar fyri framman. Borgarar okkara hava tó verið so raskir at rinda skatt, at býráðið heldur tað vera ráðiligt aftur í ár at lækka skattaprosentið, so tað í 2018 verður lækkað niður í 22,0%, so nú gongur rætta vegin.

Barnafrádrátturin í 2018 verður tann sami, **kr. 5.500**, fyri hvørt barnið. Vit ynskja tær bestu umstøðurnar fyri barnafamiljurnar.

Roknskapurin: Niðanfyri hava vit víst ársúrslitið áðrenn fígging. Sum tað sæst, hækka útreiðslurnar, so hvørt fleiri uppgávur vera lagdar á kommununa.

Ár	98	99	00	01	02	03	04	05	06	07	08
Mió. kr.	29,4	30,1	39,1	34,3	38,8	40,4	39,6	41,3	51,1	57,3	71,5

Ár	09	10	11	12	13	14	15	16	17	18	
Mió. kr.	65,2	62,4	74,0	60,9	85,4	59,0	80,6	102	89,5*	90,1*	

**) 2017 er meting, og 2018 er ætlan.*



Fólkatalið, sum minkaði nógv í kreppuárunum, er vaksið nógv seinnu árini. Nú búgva 2.056 fólk í Vága kommunu, so nógv hava ikki búð í kommununi fyrr.

Ár	88	89	90	91	92	93	94	95
Miðvágur og Vatnsoyrar	1072	1087	1066	1045	1022	994	972	959
Sandavágur	759	758	733	726	723	693	668	669
Vága kommuna	**1831**	**1845**	**1799**	**1771**	**1745**	**1687**	**1640**	**1628**

Ár	96	97	98	99	00	01	02	03
Miðvágur og Vatnsoyrar	958	963	951	953	973	1001	1024	1057
Sandavágur	662	674	682	689	677	689	722	730
Vága kommuna	**1620**	**1637**	**1633**	**1642**	**1650**	**1690**	**1746**	**1787**

Ár	04	05	06	07	08	09	10	11
Miðvágur og Vatnsoyrar	1089	1102	1104	1107	1123	1113	1111	1108
Sandavágur	739	767	797	805	833	826	832	856
Vága kommuna	**1828**	**1869**	**1901**	**1912**	**1956**	**1939**	**1943**	**1964**

Ár	12	13	14	15	16	17		
Miðvágur og Vatnsoyrar	1118	1088	1114	1130	1148	1150		
Sandavágur	854	881	881	863	875	906		
Vága kommuna	**1972**	**1969**	**1995**	**1993**	**2023**	**2056**		



Barnaansingin: Kommunan hevur nú í nógv ár nøktað tørvin á barnaansing og heldur býráðið, at hetta er sjálvsagt. Niðanfyri vísa vit útreiðslurnar av ansingini nøkur ár aftur í tíðina:

Ár	98	99	00	01	02	03	04	05	06	07
Mió. kr.	2,2	2,5	3,0	4,1	5,1	6,4	9,7	11,2	13,2	15,3

Ár	08	09	10	11	12	13	14	15	16	17
Mió. kr.	16,7	14,8	14,9	16,7	14,5	14,9	14,5	16,5	16,5	17,5*

**) 2017 er meting*



Systkinafrádrátturin í barnaansingini verður í 2018 broyttur soleiðis, at hægsta foreldragjald fyri barnaansing verður kr. 3.000, líkamikið hvussu nógv børn, familjur hava í ansing.
Í løtuni eru 180 børn í **barnaansingini** hjá Vága kommunu. 81 í Sóljugarði og 99 í Miðgarði. Harafturat eru 45 børn úr 1. og 2. flokki í frítíðaransing í Smílikulluni. Í **Skúlanum á Giljanesi** ganga 329 børn.

Námsfrøðiliga ráðgevingin (NR), sum er partur at umsitingini hjá kommununi, hevur nú 3 ár á baki. NR er eitt fyribyrgjandi tiltak og eitt tilboð til foreldur og stovnar, sum eru fevndir av dagstovnalógini.
NR arbeiðir tætt saman við dagstovnum, frítíðarskúla, skúla og BVT (Sí niðanfyri). NR hevur gjørt samstarvsavtalu við Sernám. Eisini er NR umboð í fyribyrgjandi tiltakinum SSP (sí niðanfyri). Endamálið er at tryggja, at øll børn hava eitt gott og mennandi tilboð.

Vága kommuna er við í verkætlanini **ABC fyri sálarliga heilsu**. Fólkaheilsuráðið stendur fyri verkætlanini, ið vil gera fólk varug við, hvussu vit kunnu styrkja okkara sálarligu heilsu. Vegurin til góða sálarliga heilsu kann vera fullur av jaligum upplivingum! NR umboðar kommununa í verkætlanini.
ABC fyri sálarliga heilsu er ein sálarliga heilsufremjandi ætlan, ið roynir at fáa einstaklingin at fara í gongd við at røkja og fremja sálarligu heilsuna hjá sær sjálvum og øðrum. Ein týðandi partur snýr seg eisini um at skapa karmar fyri trivnaðarfremjandi virksemi í samstarvi við feløg, kommunur og stovnar. Sí annars www.folkaheilsa.fo.

Barnaverndartænastan í Vágum er ein tænasta, sum vit veita saman við Sørvágs kommunu.
Barnaverndartænastan virkar væl og hevur veitt ymsa hjálp og stuðul, til nógvar familjur. Hetta eru fleiri, bæði foreldur, børn og ung takksom fyri.

Í løtuni starvast 6 fólk hjá Barnaverndartænastuni í Vágum. Barnaverndartænastan arbeiðir fyribyrgjandi. Tískil er tað av alstórum týdningi, at Barnaverndartænastan verður partur av málum, har tørvur er á tí, so tíðliga sum gjørligt. Hetta fyri at tryggja, at barnið fær hóskandi tilboð og neyðugu hjálpina skjótast gjørligt.

Allir borgarar hava fráboðanarskyldu, um tey hava/fáa kunnleika um viðurskifti, sum kunnu skaða heilsu og/ella menning hjá børnum. Her kann talan vera um vanrøkt, tað veri seg likamliga, kensluliga ella sálarliga vanrøkt. Eisini tá talan er um harðskap, er fráboðanarskyldan galdandi. Her kann talan vera um sálarligan, likamligan ella kynsligan harðskap. Fakfólk, sum í starvi sínum fáa kunnleika um hesi viðurskifti, ella hava illgruna um slíkt, hava skerpaða fráboðanarskyldu.

SSP er ein stytting fyri høvuðspartarnar í SSP samstarvinum - Skúla, Sosialar myndugleikar og løgreglu (Politi). SSP er ein tvørfaklig samstarvsskipan millum fakbólkar, ið fáast við børn og ung. Endamálið er at savna, samskipa og fremja felags fyriskipanir, sum skulu fyribyrgja kriminalitet og skaðandi atburð millum børn og ung. Arbeitt verður út frá virkisskránni í "Mál og mið".
Barnaverndartænastan hevur ábyrgdina av SSP samstarvinum í Vágum. Meira fæst at vita um SSP á hesi leinkju: http://www.bvs.fo/ssp

Ungdómshúsið
Leiðarin **Jákup Olaf Johannesarson** tók avgerð um at siga seg úr starvi sum leiðari í Ungdómshúsinum frá 1. apríl 2017 at rokna.

Býráðið hevur í hesum sambandi gjørt av at leggja virksemið í Ungdómshúsinum saman við tí í Frítíðarskúlanum, so **Linda Heinadóttir**, leiðari í frítíðarskúlanum, nú eisini er leiðari í Ungdómshúsinum. Linda er farin í barnsburðarfarloyvi í oktobur. Hervør Heinesen er virkandi leiðari í farloyvistíðini.

Ungdómshúsið Loftið í Sandavági treingir til stórar ábøtur og er tí stongt fyribils.
Vit eru so heppin at sleppa at læna hølini hjá **VágaSkot**, sum heldur til í **Miðvágs Skúla**. VágaSkot er eitt gott stað fyri tey ungu at koma í. Starvsfólkið ger sítt til, at øll tey ungu føla seg væl og trívast har. VágaSkot er opið fyri ungdóminum í Vágum frá 7. fl. til og við 18 ár. Opið er hesar tíðir: **mánakvøld og mikukvøld frá kl. 19 – 22 og hvørt leygarkvøld er opið frá 19 - 24**
Upplatingartíðirnar kunna broytast eftir ynski frá teimum ungu. Í Vága Skot er ein stór høll. Har til ber at hava diskotek o.a. Uppi á loftinum ber til at sita og hugna sær og práta, ella hyggja í sjónvarp. Har ber eisini til at baka, spæla playstation, borðspøl, borðtennis og annað. Uttan fyri hølini hjá VágaSkot eru eisini sera góðir møguleikar fyri virksemi. Hølini liggja nær við fótbóltsvøllin og viðarlundina.
Í løtuni eru 5 fólk, sum arbeiða í ungdómshúsinum uppá skift. 2 starvsfólk eru til arbeiðis hvørt kvøld. Hetta kemur av, at tað er ein størri tryggleiki fyri bæði tey ungu og fyri starvsfólk, um eitt hvørt skuldi hent.

Ungdómsráð
Eitt ungdómsráð við 9 ungdómum er valt. Ungdómsráðið er við til at seta dagsskránna í ungdómshúsinum. Ungdómsráðið hevur fund umleið 3 hvønn mánað, har tey leggja fram eina ætlan um virksemi fyri leiðaran. Leiðarin hevur avgerðarrætt. Mánakvøld verður roynt at hava onkran uttaníframá at koma í ungdómshúsið, t.d. hárfríðkanarkvinnur at læra bæði gentur og dreingir at seta hárið. Ætlanin er eisini at fáa SSP inn at tosa um rúsdrekka, ella onkran tónleikara at spæla tónleik, ein makeup-artist o.a. Mikukvøld er poolkappingar og champions league kvøld. Leygarkvøld er filmskvøld.
Tey ungu koma við hugskotum og íkasti til annað virksemi, sum eisini eru á skránni, m.a. at klippa jólapynt, baka, gera smúkkur, mála, borð-spælikvøld og FIFA-kappingar. Hetta virksemi er saman við tí fasta virkseminum. Hetta er, fyri at geva teimum ungu so nógvar møguleikar sum gjørligt, alt eftir umstøðunum.

Í skúlafrítíðunum hevur kommunan **tilboð til lesandi** um at nýta hølir hjá kommununi, har tey kunnu lesa, skriva uppgávur og annars fyrireika seg til próvtøkur. Hetta tiltak hevur eydnast væl, hóast ikki so nógv taka av tilboðnum longur. Ætlanin er tó framyvir at veita hetta tilboð í frítíðum og annars, tá tørvur er á hesum. Vit vilja hervið heita á tey ungu ella lesandi, um at kunna kommununa, um tey hava tørv á, at kommunan veitir teimum ein beina á einhvønn hátt. Tað kann t.d. vera høli til fjarðlestur ella líknandi.
Nøkur lesandi arbeiða við at gera høvuðsuppgávu í útbúgving sínum, har arbeiðspláss ella onnur viðurskifti í kommununi vera viðgjørd. Hetta gleðir okkum almikið og kann vera við til at betra um viðurskifti í kommununi.

Vága Listastova heldur til í **Várgleði**. Her er møguleiki hjá listafólki at samlast og at mála. Har hevur verið sera nógv virksemi, síðan tilboðið byrjaði. Hetta tiltak hevur varpað ljós á, at vit í kommununi eiga fleiri dugnalig listafólk, sum nógv okkara ikki vistu um frammanundan. Fleiri teirra hava nú havt væleydnaðar framsýningar. Kvøldskúlin nýtir eisini bygningin til virksemi sítt nakrar ferðir um vikuna, eins og Visit Vagar skipar fyri konsertum og øðrum tiltøkum í hølunum.
Vevskúlin undir kvøldskúlaskipanini heldur til í Gamla Skúla í Sandavági. Har ganga fólk úr allari oynni. Her er talan um eitt sera vældámt tiltak. Áhugin at veva er so stórur, at ilt er hjá nýggjum vevarum at sleppa framat.
Heilsudepilin í Vágum er góðkendur av landsstýrismanninum. Bygningurin var tikin í nýtslu fyri meira enn 30 árum síðan og treingir til ávísar ábøtur. Komandi ár er ætlanin at skifta klædningin.
Í Heilsudeplinum starvast kommunulæknar saman við læknaskrivarum, Heimasjúkrarøktarfrøðingar, heilsufrøðingar, jarðarmóður, kostráðgevi, fysioterapeutur og økispsykiatari og sálarfrøðingur.

Vit fegnast um, at fleiri at **ítróttarfólkum** okkara hava fingið sera góð úrslit í árinum, sum fór. Tó høvuðsendamálið við ítróttini er tann sosiala samveran.

Vit eru so heppin at hava nógv fólk í kommunu okkara, sum gera **sjálvboðin arbeiði**. Hesi fólk gera sjáldan nakran háva av sær, men arbeiði teirra er av alstórum týdningi fyri samfelag okkara. Vit kunna nevna fólk, sum arbeiða innan andaligar felagsskapir, ítróttarfeløg, hjálparfelagsskapir og aðrar felagsskapir. Eisini eru tað onnur, sum taka upp órudd, hampa um, planta trø ella seta í stand ymiskt gamalt. Og so eru tað onnur, sum vitja fólk, gomul sum yngri, sum sita einsamøll av einihvørji orsøk, ella gera aðrar góðgerðir, sum fjøldin einki kennir til. Býráðið ynskir at takka tykkum øllum so hjartaliga fyri góðgerðir tykkara, tí uttan tykkum var samfelag okkara fátækt.

Umhvørvisplássið er blivið dýrari at reka, hóast tað eru góðir møguleikar at skilja burturkastið. Í 2013 vóru útreiðslurnar av plássinum (gjald til IRF + lønir) kr. 964.000 meðan hesar útreiðslur í 2017 eru vaksnar til kr. 1.400.000.
Nú tíðirnar eru góðar, kemur meira á umhvørvisplássið, men burturkastið verður enn ov illa skilt. Vit vilja her nýta høvið til at heita á borgarum okkara um at **skilja burturkastið** væl og virðiliga, áðrenn farið verður frá húsum. Kommunan hevur seinastu tíðina havt ungfólk at hjálpa til við at skilja burturkastið. Hesi hava verið sera røsk at hjálpa fólki, og fólk eru eisini glað fyri tey.
Allir borgarar í kommununi kunna ***frítt*** lata burturkast frá húsarhaldinum á umhvørvisplássið. Ikki er loyvt at koma við størri nøgdum enn einum rúmmetri í senn, uttan frammanundan at hava avtalað hetta við tann, sum passar umhvørvisplássið, tí annars er skjótt, at nøkur fá fólk fylla bingjurnar, meðan onnur ikki sleppa av við sítt burturkast.
Fólk, sum hava nógv burturkast í samband við bygging, umbygging ella annað, skulu leiga bingju frá IRF. Tað skulu fyritøkur eisini gera.

Upplatingartíðirnar á **Umhvørvisplássinum (**Bingjuplássinum) eru hesar:

Týsdag til fríggjadag	***frá kl. 16^{00} til kl. 18^{00}***
Leygardag	***frá kl. 14^{00} til kl. 16^{00}***

Upplatingartíðirnar síggjast eisini á heimasíðuni og í IRF kalendaranum.

Blái Krossur hevur sett eina bingju á umhvørvisplássið til **endurnýtslu**. Vit vilja hervið heita á borgarar okkara um at seta tað, sum kann endurnýtast, í hesa bingjuna. Ráðgeving fæst frá tí, sum umsitur bingjuplássið.

So noyðast vit at endurtaka áheitan okkara á fólk, **sum nýta brenniovnar, ella kynda upp**. Takið atlit til grannar tykkara!!! Flestu fólk eru so friðarlig, at tey ikki vilja gera vart við seg, um grannin ger okkurt, sum er til ampa fyri tey. Men vit vita øll, hvussu keðiligt tað kann vera t.d., um

- ein hevur latið vindeyguni upp fyri at lufta út, at rúmið so verður fult av royki, tí onkur kyndir upp í grannalagnum.
- Ein er noyddur at taka klæðini av snórinum og vaska tey umaftur, tí tey lukta av royki.
- At ein ikki kann hava ein barnavogn standandi uttanfyri fyri royki.

Hálka er ein avbjóðing um vetrarnar. Í hálku hevur kommunan nú í fleiri ár stroytt salt á teir vegir, har mest ferðsla er. Eisini er kavi grivin eftir førimuni.
Kommunan hevur sett nakrar saltkassar við ymsar brekkur í bygdunum. Kassarnir eru myrkagrønir, og ein spaki liggur í hvørjum. Ætlanin er, at fólk, sum brúka brekkurnar, sjálvi skulu stroya salt á, tá gler er, og kommunan ikki hevur nátt at salta.

Býráðið hevur havt 15 fundir í 2017 og hevur viðgjørt 143 mál, Fíggjarnevndin hevur havt 13 fundir og viðgjørt 132 mál, Tekniska nevnd hevur havt 15 fundir og viðgjørt 203 mál, Mentunar- og Trivnaðarnevndin hevur havt 12 fundir og viðgjørt 108 mál. Vinnu- og havnanevndin hevur havt 9 fundir og viðgjørt 24 mál.

Vága kommuna hevur fleiri fólk í starvi eftir lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk, talan eru um fólk í vardum starvi, tillagaðum starvi og í arbeiðsroynd. Vit eru sera glað fyri at kunna bjóða okkum fram, og er tað sera umráðandi, at kommunan er ein virkin viðspælari á hesum økinum.

Avgreiðslutíðirnar á býráðsskrivstovuni eru: Mánadag til fríggjadag frá kl. 10^{00} til 12^{00} og 13^{00} til 15^{00}.

TAÐ BER TIL AT GERA AVTALU UM FUND VIÐ BORGARSTJÓRAN VIÐ AT VENDA SÆR TIL SKRIVSTOVUNA Á TLF. 34 44 00 Í AVGREIÐSLUTÍÐINI.

Hetta var í høvuðsheitum gongdin í 2017. Tey, sum ynskja at vita meira, eru hjartaliga vælkomin at fara inn á heimasíðu okkara vaga.fo at fáa fleiri upplýsingar. Á heimasíðuni verður kunnað um tað, sum dagliga hendir í kommununi. Eisini eru kort av kommununi at finna har eins og kort av kirkjugørðunum sum vísa, hvar fólk eru grivin.
Fólk eru eisini vælkomin á býráðsskrivstovuna at fáa fleiri upplýsingar.

Vit takka borgarum okkara fyri tann stuðul og positiva anda, sum tit hava víst býráðnum.

Gott nýggjár og Guds signing ynskja vit tykkum øllum.

Sandavági, tann 30. desembur 2017

Vága kommuna

Eyðdis H. Niclasen, borgarstjóri